## Felagsskúlin á Oyrarbakka



**Søkt verður eftir 4 lærarum**

- 4 føst fulltíðarstørv.
  Størvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, ið settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

**Førleikakrøv**

Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu linjum/lærugreinaøkjum.
Umsøkjarar við aðrari viðkomandi útbúgving eru vælkomnir at søkja, men kunnu tó ikki setast í fast starv.

**Hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum/lærugreinaøkjum í 8., 9. og 10. fl. :**

- undirvísa gentum í ítrótti og svimjing
- undirvísa í handverk og list
- undirvísa í støddfrøði og alisfrøði
- undirvísa í føroyskum, donskum, enskum og týskum
- undirvísa í kristni, lívfrøði, landalæru og søgu

**Søkt verður eftir lærarum, sum**

- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Lønar- og setanartreytir**

Setanarøkið er Felagsskúlin á Oyrarbakka. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.
Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.
Størvini verða sett frá 1. august 2008.

**Um skúlan**

Felagsskúlin á Oyrarbakka er ein nútímans skúli við teimum hentleikum, lærubókum og aðrari útgerð, ið dygdargóð frálæra krevur av einum skúla. Stovurnar eru ljósar við góðari luftútskiftingarskipan.
Í Felagsskúlanum ganga 90 næmingar í 8., 9., og 10. flokki og har starvast 11 lærarar.

· Skúlavegur 8 · 400 Oyrarbakki · tlf. 21 20 84 · t-postur: joningi@skulin.fo

· Umsóknarfreistin er mikudagin 13. mai, kl. 12.00.

# Jóhan Hendrik Winther Poulsen




- Hann hevur verið ímyndin av føroyskum málstrevi seinastu hálvu øldina.
- Hann var ímyndin av Føroyamálsdeildini í farnu øld.

- Hann er ímyndin av góðum føroyskum orðasmiði.
- Hann hevur smíðað okkum orð, vit øll nýta og fegnast um.
- Hann hevur givið nýggjum føroyskum máli sterkan samleika.

- Føroyskt hevði verið nógv fátækari, hevði JHWP ikki virkað, sum hann hevur gjørt.

Hevur tú hug at siga honum, nú hann fyllir 75, at tú virðismetir tað arbeiði, hann hevur lagt eftir seg, kanst tú seta teg fyri bókina, ið kemur út dagin, hann fyllir 75 – tann 20 juni – og fáa navn títt á kvøðulistan.

Far inn á www.sprotin.fo – set teg fyri bókina og fá títt navn skrivað í kvøðulistan. Evstafreist er 15. mei.

Bókin, sum telur 1000 síður, fæst fyri serprísin 400 kr.

SPROTIN

Hornavegur 12 · FO-350 Vestmanna · Tel 424248 · Fartel 214248